## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landnyrðingi, um kvøldið lot av ymsum ættum. Sólglottar, men okkurt kavaælið. Hitalagið millum ÷3 stig og frostmarkið.




**Veðrið hósdagin:**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av landsynningi og vátakavi, seinni regn. Hitin millum 1 og 4 stig. Út á seinnapartin hvassur vindur av útsynningi og regnælingur. Hitin millum 5 og 8 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 5 og 8 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi og stundum regn. Hitin millum 5 og 9 stig.



*Sløkkiliðið í Havn gremur seg javnt og samt um líkasæluna, ið valdar, tá olja verður flyt á skip. Í heilum verður hetta arbeiðið so illa umgingið, og tað gongur út yvir vágna...*

# Havnarvág er sera illa dálkað

**Umhvørviskanning vísir, at Havnarvág er ein av mest dálkaðu havnum í Norðurlondum. Vágin er illa dálkað av skarni, tøðevnum, olju, metallum, tungmetallum o.ø.**

UMHVØRVI
*Eirikur Lindenskov*

Kanningararbeiðið av dálkingarstøðuni á Havnarvág, sum Tórshavnar kommuna setti í verk á sumri 2002, er nú um at vera liðugt.

Frágreiðingin »Havnarvág 2002 - ein kanning av dálkingarstøðuni á Havnarvág og yviri við Strond á sumri 2002« (fyribilsútgáva) vísir, at sammett við norskar og svenskar klassificeringar er Havnarvág sum heild illa dálkað og summastaðni sera illa dálkað av skarni, tøðevnum, olju, metallum, tungmetallum og øðrum umhvørviseiturevnum.

Kanningin vísir, at eitrandi evni finnast í nøgdum, sum hava skaðiligt árin á umhvørvið. Staðfest er, at reyðfiskur, sum er fiskaður á vági, hevur fingið árin av dálkingini.

Reyðfiskur, sum er fiskaður á vági, inniheldur umhvørviseiturevni (m.a. PCB) í nøgdum, sum sambært danska Veterinær og Fødevaredirektoratet eru ásettar at vera „heilsuliga ivasamar".

Í mun til umhvørviskanningina, sum býráðið lat gera av Havnarvág í 1987, er dálkingarstøðan í flestu førum nógv versnað. Serliga er dálkingin av kyksilvur sera nógv versnað, men eisini dálkingin av blýggi er sum heild økt. Talið av djórum, hoyrandi til djórasløg ið eru sermerkt við at liva í dálkaðum umhvørvi, er eisini munandi økt í mun til 1987.

Sammett við havnir í Danmark er dálkingarstøðan av ávísum evnum á hædd við mest dálkaðu donsku havnirnar, og í ávísum førum er støðan munandi verri enn í donskum havnum.

– Tórshavnar kommuna fer við støði í kanningini undir at viðgera støðuna og gera eina virkisætlan fyri tey tiltøk, sum skulu setast í verk fyri at loysa trupulleikarnar, soleiðis at dálkingin av Havnarvág kann minka og vágin aftur gerast rein, sigur Jan Christiansen, borgarstjóri.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -6 |
| Nuuk | -4 |
| Qaqortoq | -3 |
| Ammassalik | -12 |
| Saint John's | -1 |
| Halifax | -5 |
| Reykjavík | -5 |
| Seyðisfjørður | -3 |
| Tórshavn | 3 |
| Lerwick | 3 |
| Aberdeen | 5 |
| London | 9 |
| Tromsø | -7 |
| Bergen | 4 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 1 |
| Keypmannah. | 3 |
| Helsinki | 0 |
| Moskva | -2 |
| Berlin | 7 |
| Warzawa | 1 |
| Kiev | -6 |
| Bukarest | 0 |
| Paris | 9 |
| Madrid | 7 |
| Róm | -- |
| Malorca | 14 |
| Athen | 11 |
| Malta | 14 |
| Tunis | 11 |
| Beijing | 0 |
| New Dehli | 9 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 29 |
| Sydney | -- |
| New York | 0 |
| Miami | 14 |
| Los Angeles | 16 |
| Meksikobýur | 15 |
| Panama | 30 |
| La Paz | 12 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 29 |

### LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 974 hPa við Skotland fer í landsynning og grynnist.




**Í dag:**
Ein hátrýstryggur, 1008 hPa vestan fyri Skotland verður yvir Føroyum mikukvøldið. Lágtrýstið sunnan fyri Hvarvið fer eystureftir og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum hósdagin.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 20/01 kl. 06⁰⁰– 21/01 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 2,7°
Minsti hiti máldur í jan.: ÷8,8° Mesti hiti máldur í jan.: 11,6°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 7,0 mm – mált frá 20/01 kl. 06⁰⁰–21/01 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í januar: 152,9 mm

Spf.
...hvør sigur at vit eru sum onnur?
Dvørgastígur 7
100 Tórshavn
tel 31 45 55
fax 31 80 26
hestoy@hestprent.fo
HESTPRENT

www.sosialurin.fo

## VESTFALLSKYRRINDI

23. jan.: Mánin næstur jørðini
25. jan.: Seinna kvarter

Kelda. Álmanakkin 2002

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 22. jan | 09.38 | 22.00 | 08.38 | 21.00 | 08.53 | 21.15 | 11.38 | — | 00.16 | 12.38 | 07.53 | 20.15 | 06.53 | 19.15 | 09.53 | 22.15 | 10.53 | 23.15 | 09.23 | 21.45 | 10.38 | 23.00 |
| 23. jan | 10.22 | 22.44 | 09.22 | 21.44 | 09.37 | 21.59 | 00.00 | 12.22 | 01.00 | 13.22 | 08.37 | 20.59 | 07.37 | 19.59 | 10.37 | 22.59 | 11.37 | 23.59 | 10.07 | 22.29 | 11.22 | 23.44 |
| 24. jan | 11.07 | 23.43 | 10.07 | 22.43 | 10.22 | 22.58 | 00.44 | 13.07 | 01.44 | 14.07 | 09.22 | 21.58 | 08.22 | 20.58 | 11.22 | 23.58 | — | 12.22 | 10.52 | 23.28 | — | 12.07 |
| 25. jan | — | 12.22 | 11.22 | — | 11.37 | — | 01.43 | 14.22 | 02.43 | 15.22 | 10.37 | 23.16 | 09.37 | 22.16 | — | 12.37 | 00.58 | 13.37 | — | 12.07 | 00.43 | 13.22 |
| 26. jan | 01.01 | 13.39 | 00.01 | 12.39 | 00.16 | 12.54 | 03.01 | 15.39 | 04.01 | 16.39 | 11.54 | — | 10.54 | 23.19 | 01.16 | 13.54 | 02.16 | 14.54 | 00.46 | 13.24 | 02.01 | 14.39 |

5 707265 100036 >